

www.oljan.fo

**Jan Müller** 17 - 12 - 2011

# Maersk bílagt skip fyri 1,2 milliard

Danska felagið Maersk Supply Service hevur skrivað undir sáttmála við skipasmiðjuna Asenav í Kili um at byggja tvey frálandaskip fyri tilsamans 1,2 milliard krónur. Maersk Supply Service skal brúka tey bæði skipini á kanadiska frálandamarknaðinum, og tey skulu setast í drift har ístaðin fyri verandi skip. Carsten Plougmann Andersen í Maersk Supply Service sigur við fjølmiðlar, at arbeiðsumstøðurnar verða munandi betri umborð á teimum nýggju skipunum enn teimum, sum felagið nú hevur á kanadiska marknaðinum. Tey bæði nýggju skipini kunnu loysa fleiri uppgávur innan frálandavinnuna so sum akkersflyting, vaktarhald og vanligar tænastur fyri bori- og aðrar pallar. Harafturat kunnu tey veita pallunum brennievni, vatn og borievju. Tey nýggju skipini eru lið í einari íløguætlan, har Maersk Supply Service leggur seg eftir útbyggingum til arbeiði á djúpum vatni og á veðurringum leiðum.